# Broyting í at innrita í BSL á Landsneti

4. desember 2017

GJALDSTOVAN

**Teldur innlimaðar í Landsnet**

Nú eru BSL brúkarar á Landsneti innritaðir í BSL, tá innritað er á teldur, ið eru innlimaðar í Landsnet.

Íverksetanin av broytingini hevur við sær, at BSL er tøk, longu tá innritað er á telduna, eins og teldupostur, skjøl, og aðrar dátur hjá stovninum. So neyðugt er ikki longur at skriva brúkaranavn og loyniorð umaftur, tá farið verður inn í BSL.

Av hesi orsøk, verður tí mint á týdningin **at læsa skermin** hjá sær, tá farið verður frá honum.

Á síðu 4 er vegleiðing um innritan í BSL á teldum, ið ikki eru innlimaðar í Landsnet.

**Fortreytir fyri ágóðanum**

Við Internet Explorer og Chrome, fær tú ágóðan av broytingini, uttan at broyta nakað.

Viðvíkjandi Firefox kann vera neyðugt at gera nakrar tillagingar. Ein loysn er at leggja Firefox inn av nýggjum frá Software Center. Onnur loysn er at gera eina lítla broyting í kaganum, sambært vegleiðingini niðanfyri.

**Vegleiðing til uppsetan av Firefox kaganum**

Skriva: “about:config” sum url í tín Firefox kaga.




Trýst á **Jeg lover at være forsigtig!**.



Skriva “negotia” í teigin **Søg**, og dupultklikka á **network.negotiate-auth.trusted-uris**.




Skráset “.gov.fo” sum **streng værdi** og trýst **OK**.



So er ".gov.fo" skrásett.




| Indstillingsnavn | Status | Type | Værdi |
|---|---|---|---|
| network.negotiate-auth.allow-non-fqdn | standard | boolsk | false |
| network.negotiate-auth.allow-proxies | standard | boolsk | true |
| network.negotiate-auth.delegation-uris | standard | streng | |
| network.negotiate-auth.gsslib | standard | streng | |
| network.negotiate-auth.trusted-uris | brugerdefineret | streng | .gov.fo |
| network.negotiate-auth.using-native-gsslib | standard | boolsk | true |
| security.ssl.require_safe_negotiation | standard | boolsk | false |
| security.ssl.treat_unsafe_negotiation_as_broken | standard | boolsk | false |

# Broyting í at innrita í BSL á Landsneti

4. desember 2017

**Teldur uttanfyri Landsnet**

Tá innritað verður í BSL á teldur, ið ikki eru á Landsneti, við Internet Explorer ella Chrome, kemur ein nýggj innritingarmynd fram.

Trýst á Annuller/Cancel ella á Escape, so kemur vanliga innritingarmyndin fram.







